# Gerrard bjargaði Liverpool

Tað vóru farnir meira enn tríggir minuttir av yvirtíðini, tá ið miðvallarovastin hjá Liverpool, Steven Gerrard, skoraði sigursmálið í dystinum ímóti Middlesbrough á Anfield Road leygardagin. Dómarin legði annars tríggjar minuttir afturat, men ein steðgur kom í dystinum beint fyri leiklok, og tí fekk Liverpool ein seinasta minutt at fáa sigursmálið, og tað eydnaðist. Liverpool vann dystin 2-1 og hevur fyri fyrstu ferð í fleiri ár vunnið tveir teir fyrstu dystirnar í einum kappingarári.



# Seinasta tilboð til Tottenham

Sir Alex Ferguson er meira enn vanliga forliptur uppi í álopsspælaranum Dimitar Berbatov, sum spælir fyri Tottenham, og Manchester United hevur roynt at keypa spælaran. Tað hevur ikki eydnast higartil, og United, sum ætlar at styrkja liðið við einum álopsspælara áðrenn freistina 1. september, hevur nú givið Tottenham eitt seinasta boð upp á Berbatov. Tilboðið er 25 milliónir pund.



*Jógvan Martin Olsen tók í morgun út A-landsliðshópin til komandi uppgávurnar. Her sæst hann saman við Bill McLoud Jacobsen og Heðini Askham, U21-venjarum, sum eisini tóku sín hóp út til komandi uppgávurnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Høgni gleið út

**Jón Rói Jacobsen er nú aftur tøkur, og Høgni Madsen er einasti spælarin, sum er gliðin úr landsliðshópinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jógvan Martin Olsen kunngjørdi í morgun, hvørjar spælarar hann hevur við sær, tá A-landsliðið í fótbólti í næstum spæla undankappingardyst móti Serbia og Rumenia.

Í mun til hópin móti Portugal var greitt, at Jón Rói Jacobsen aftur var tøkur, og ikki óvæntað var hann millum teir 18, sum vórðu úttiknir.

Tí skuldi Jógvan Martin sálda ein spælara frá, og hesin gjørdist Høgni Madsen úr ÍF.

Dysturin móti Serbia verður á útivølli tann 6. september, og 9. september verður so heimadystur móti Rumenia.

## Skulu frameftir

Seinasta uppgávan hjá landsliðnum var í Portugal, har liðið eisini mátti vera fleiri týðandi spælarar fyriuttan.

Jógvan Martin Olsen sigur, at hann sum so var nøgdur um tað, sum hann sá seinasta mikudag – serliga í verjupartinum – men hann vónar, at tað kann bera til at betra um føroyska uppspælið.

- Í Portugal var Rógvi øgiliga einsamallur, og tá tað so eisini er móti monnum sum Pepe og Carvalho, so fær hann ikki gjørt tað stóra. Her mugu vit so finna útav, um vit skulu broyta um uppspælið, ella um vit kunnu fólkið longur niðan á vøllin.

Kann tað geva eitt pláss í byrjunaruppstillingini til Boga Løkin, Arnbjørn Hansen ella Andrias Lava Olsen, nú Christian Lamhauge Holst ikki er tøkur at fylla tann leiklutin út?

- Tað fari eg ikki at siga her og nú. Tað veldst eisini um, hvussu vit velja at skipa uppspælið, men gjarna kann tað verað ein maður við eitt sindur av ferð í, segði Jógvan Martin Olsen.

## FAKTA um dystin

A-landsliðið
Jákup Mikkelsen, KÍ
René Tórgarð, EB/Streymur
Leif Niclassen, EB/Streymur
Jóhan T. Davidsen, NSÍ
Jón Tór Næs, NSÍ
Egil á Bø, EB/Streymur
Bartal Eliasen, ÍF
Jón Rói Jacobsen, Frem
Atli Danielsen, Frem
Símun Samuelsen, Keflavík
Christian Høgni Jacobsen, AB
Mikkjal Thomassen, EB/Streymur
Bárður Olsen, EB/Streymur
Bogi Løkin, NSÍ
Jákup á Borg, B36
Rógvi Jacobsen, KÍ
Arnbjørn Hansen, EB/Streymur
Andrias Lava Olsen, Víkingur

**U21-landsliðið**
Gunnar Nielsen, Motherwell
Pól Johannus Justinussen, B68
Odmar Færø, B36
Magnus Olsen, B36
Poul Thomas Dam, HB
Levi Hanssen, EB/Streymur
Sølvi Vatnhamar, Víkingur
Ólavur S. í Ólavsstovu, HB
Emil N. Leifsson, KÍ
Kristoffur Jakobsen, KÍ
Gudmund S. Nielsen, B71
Fritleif í Lambanum, ÍF
Øssur Dalbúð, NSÍ
Rógvi Poulsen, HB
Pætur T. Jørgensen, HB
Tórður Thomsen, NSÍ
Róaldur Jacobsen, B36
Erling Jacobsen, FC Amager

# Farvæl til Eysturskúlan

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Tá kastararnir fyri seinastu ferð dystaðust á kastivøllinum við Eysturskúlan oysti regni so niður, at ein kundi billað sær sjálvum inn, at vøllurin græt soleiðis sum droparnir komu í stríðum streymum úr erva. Hóast ringa veðrið darvaði kastararnum so steðgaði tað teimum tó ikki

Besta úrslit á degnum stóð Randi Kúrberg fyri í hamarkastinum tá hon kastaði hamaran út á 35,56 m. Annars vóru úrslitini so sum so, og var tað kanska serliga í diskus at úrslitini vóru serliga nógv ávirkaði av veðrinum. Hetta tí at ein ikki kann halda á einum vátum diski.

**Úrslitini vóru:**

**Kasti 5-kamp, kvinnur:**
1 Randi Kúrberg 2211 stig
2 Meiðfríð Hansen 1800 stig

**Kasti 5-kamp, menn:**
1 Heri Ziska 2245 stig
2 Rógvi Højgaard 1621 stig
3 Uni Højgaard 1253 stig
4 Hjalti Lamhauge 1012 stig

**Vektkast, kvinnur:**
1 Randi Kúrberg 7,04 m
2 Meiðfríð Hansen 5,44 m

**Vektkast, menn:**
1 Heri Ziska 10,40 m
2 Uni Højgaard 6,76 m
3 Hjalti Lamhauge 6,73 m
4 Rógvi Højgaard 6,10 m

Næsta kapping hjá vaksnukastararnum verður opin kapping tann 13 desember, og verður tað á Tórsbreyt, skrivar www. hvirlan.fo

# Fegnast um at missa spælarar

**Úttøkan hjá U21-landsliðnum er merkt av, at fleiri spælarar eru togaðir upp á A-landsliðið. Men tað er nú ikki bara ringt, halda venjararnir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Sjálvandi vilja vit eisini hava sterkasta møguliga landsliðið, men tað er nú einaferð so, at A-landsliðið er A-liðið, meðan vit eru B-liðið at kalla. Og eg haldi eisini at tað væl og virðiliga prógvar nyttuna í U21-liðnum, at vit til komandi uppgávurnar mugu vera seks spælarar fyriuttan.

Soleiðis sigur Heðin Askham, sum saman við Bill McLoud Jacobsen er venjari hjá føroyska U21-landsliðnum í fótbólti.

Teir báðir hava nú úttikið hópin til dystirnar móti Azerbadjan og Grikkalandi, sum báðir verða á útivølli ávikavist 6. og 9. september.

Leif Niclasen, Jóhan Tróest Davidsen, Jónas Tór Næs, Bogi Løkin, Arnbjørn Hansen og Andrias Lava Olsen eru allir uppløgd evni til U21-liðið, men felags fyri teir seks er, at teir eru at síggja í A-landsliðshópinum.